HANSVIK
18" trevjubátur við 60 HK Johnson uttanborða bensinmotori, til sølu fyri sámuligan prís. Tlf. 312337

FISKIDAGAR
til sølu.
Tlf. 444314 -282722, e. kl. 18

VIKSUND 25'
Sera væl viðlatin við 45 HK diesel Volvo Penta motori, ið er lítið brúktur. Báturin er sera vælegnaður at ferðast við og til frítíðarfiskarí. Ymisk útgerð fylgir við. Tlf. 283860

100 SNELLUHÚKAR
til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 327130, e. kl. 19

Bingo

STUDLAFELAGIÐ Í.S.B.
hevur gott bingo í Klubbanum týsdagin 2. juni kl. 19.30. 10 ókeypis plátur til limimar. Burturlutað verður m.a. Apex flogferð til Danmarkar. Nevndin

EYDNUHJÓL
verður í skúlanum í Funningi 1. juni kl. 16 (2. hvítusunnudag). At vinna: lomb, uttanlandsferð, mikroovnur, sodavatn, karamellur o.a. Kaffi o.a. fæst til keyps.
Funnings Bygdarfelag

GOTT BINGO
verður í Eydnuni leygardagin 6. juni kl. 19. Full pláta 400 kr. Høvuðsvinningur gávukort frá Smyril Line á 2.500 kr. og nógv annað gott.
Sunda Róðrarfelag

STUDLAFELAGIÐ GLOTTIN
hevur bingo í Pálsstovu leygardagin kl. 15. Gávukort á 500 kr. til fulla plátu + síðuvinningar. Drigið verður millum spælini. 15 vinningar á lutaseðlinum, m.a. ein Apex flogferð. 12 plátur fyri 100 kr.
Stuðlafelagið Glottin

EYDNUHJÓL
Funnings Bygdarfelag hevur eydnuhjól í Funningi 1. juni (2. hvítusunnudag) kl. 16. Vit taka ímóti lutum í skúlanum hóskvøldið kl. 20.30 til 22.00.
Funnings Bygdarfelag

NORDINGAR!
Gott bingo verður í Haraldsundi leygardagin 30. mai kl. 16.
Bygdarfelagið Ljósið, Haraldsund

KOKUTOMBOLA
verður í FK í Saltangará leygardagin 30. mai kl. 10.
Bragdið

KOKUTOMBOLA
til frama fyri Partille Cup verður í SMS fríggjadagin 12. og leygardagin 13. juni.
Neistin

GOTT BINGO
verður í Bygdarhúsinum í Hósvík sunnudagin 7.juni kl. 16. Nógvir góðir vinningar. 12 plátur fyri 100 kr. 6. og 12. spæl gávukort á 500 kr. Drigið verður millum spælini. Eykaspælið gávukort á 4500 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Bygdarfelagið Varðin

GOTT BINGO
verður í Pálsstovu 2.hvítusunnudag 1 juni kl. 16. 12 plátur fyri 100 kr. Full pláta 500 kr. Høvuðsvinningur ein vikuskiftis flogferð til Danmarkar. Drigið verður millum spælini. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Gjáar Samkomuhús

FRÍTT VAL BINGO
hvørt mikukvøld kl. 19.30 í Tórs Cafeteria. Nógvir góðir vinningar. 12 plátur fyri 100 kr. Øll eru vælkomin.
Tór's Klubbin, tlf. 15438

Brævaskifti

BRÆVASAMBAND
við filippinskar familjur kann fáast við at tekna seg sum sponsor fyri skúlagongd og sjúkrakassagjaldi hjá einum fátækum barni. Sponsorgjaldið er 120 kr. um mánaðin. Mynd, navn, føðingardagur og familjuupplýsingar verða útvegað!
Føroysk Filippinsk Tænasta
Tlf. 12424 og tlf. 075 50 95 09

Burturm. /funnið

FUNNIÐ!
Gani við boyla funnin á wc'num á Shellstøðini við Streymin í viku 20.
Tlf. 422255

FØROYSK HÚGVA UMBÝTT
Á dansistevnuni í Klaksvík 16. mai varð húgva mín umbýtt í veitsluni í Skálanum. Vinarliga ring til mín, um tú hevur hana ella veitst um hvar hon kann vera.
Tlf. 317560

MOTTIL UMBÝTTUR
Á dansistevnuni í Klaksvík 16. mai varð mottil mín umbýttur í veitsluni í Skálanum. Mottil mín hevur kinaflippu og víkingaskipmynstur, annars reytt fóður. Tann, sum eg kom heim við, er líka, men hevur onga flippu og í fóðrinum stendur made in England. Vinarliga ring til mín, um tú hevur hann ella veit um hvar hann kann vera.
Tlf. 371810

TÚ, SUM LEYGARKVØLDIÐ
9. mai tók mín svarta leðurjakka, konufólkajakki std. small, í Badmintonhøllini, tú verður biðin um at leggja hann aftur beinanvegin, annars verður tú at hoyra nærri frá okkum.
Tlf. 315548

Býli

BALLERUP
Íbúð til leigu í Ballerup í tíðarskeiðnum 27.6.-18.7.
Tlf. 044682289 - mobil 040320287

FRÍTÍÐARHÚS Á GLYVRUM
til leigu. Í Marknagarðshúsinum eru allir vanligir hentleikar.
Tlf. 447583

FRÍTÍÐARHÚS Í KUNOY
til leigu.
Tlf. 456247

HÚS Í HVALBA
til sølu.
Tlf. 375293

YNSKIST
Hús ella íbúð ynskist til leigu.
Tlf. 319587

TIL LEIGU
Sethús á Tvøroyri til leigu. Hava frítt útsýni. Tvær stovur, køk, wc/bað, 3 verilsir (80 kvm), kjallari, hjallur og neyst.
Tlf. 044923990 - 040753990 - 311745

YNSKIST
Íbúð ella verilsi ynskist til leigu í Tórshavn. Eg royki ikki og eri friðarligt mannfólk.
Tlf. 314473

SKÓTAHÚSIÐ KAMBUR
Leguhúsið á Kambsdali verður útleigað til felag, stovnar og onnur fyri eitt vikuskifti ella nakrar dagar mitt í viku. Er væl egnað til skeið og legur. Upp til 44 fólk kunnu búgva innandura. Nærri upplýsingar fáast frá skrivstovu okkara, tlf. 311075, fax 310775.
KFUM-skótarnir í Føroyum

SKÓTADEPILIN Á SELATRAÐ
Legudepilin verður útleigaður til felag, stovnar og onnur fyri eitt vikuskifti ella nakrar dagar mitt í viku. Er væl egnað til skeið og legur. Upp til 52 fólk kunnu búgva innandura, umframt tjaldingarmøguleikar. Nærri upplýsingar fáast frá skrivstovu okkara, tlf. 311075, fax 310775. Best fáir dagar eru eftir hesumegin ólavsøku.
KFUM-skótarnir í Føroyum

TIL LEIGU
80 kvm ljós og góð loftsíbúð í Havn til leigu. Inniheldur: Altan, stovu, 3 kamar, køk og bað. Mánaðarleiga 3.500 + el og hita. 3 mðr. depositum.
Tlf. 044923990 - 040753990 - 311745

TIL LEIGU
150 kvm goymslurúm/kjallarahøli í Havn til leigu. Er partvís innrættað við skrivstovuhøli, køki og wc. Er tætt til veg við innkoyring.
Tlf. 044923990 - 040753990 - 311745

Í SANDOYNNA AT FERÐAST!!!
So eru stór og góð hús við øllum hentleikum í Skopun til leigu. Húsini eru vælegnað til bólkar. Frætt nærri á
Tlf. 361417 - 361334

KEYPMANNAHAVN
Íbúð til leigu í juni mðr. 15 min. gongutúrur til ráðhúsplássið, 4 sovipláss, møguleiki fyri eyka uppreiðing.
Tlf. 312205 - 288205

TIL SØLU
Fult møblerað 3 ver. íbúð á Amager (Øresunds koll.) við atgongd til maskimaskinu, til leigu frá 1. juli til 1. aug. fyri 1.000 kr. um vikuna. Í ein mðr. tó fyri 3.500 kr.
Tlf. 03886781

HÚS Í SKÁLAVÍK
Um hóskandi boð fæst, eru ein hús til sølu. Húsini eru 131 kvm í einari hædd. Bygd í 1987.
Tlf. 333050

FERÐIST Í SUÐUROY
Á Økrum hava vit eini hugnalig frítíðarhús við øllum vanligum hentleium. Bert kr. 300 pr. nátt.
Tlf. 283860 / 312517

KOM TIL NÓLSOYAR AT FERÐAST!
Kunningarstøðin kann bjóða tykkum túrar, yvirnátting og mat. Góðir tjaldmøguleikar. Hava vakurt útsýni yvir oynna. Ring og spyr Nólsoyar Kunningarstøð,
Tlf./fax 327171

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
3 verilsis íbúð til leigu frá 19. juli til 15. aug. Nær við centrum. Prísur 5.000 kr. Mugu fara væl um.
Tlf. 032950552, e. kl. 17

ÍBÚÐ Í HIRTSHALS
til leigu frá 30/6 til 21/7.
Tlf. 098944226

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í summarfrítíðini, evt. í býti við 3 verilsis íbúð í Århus.
Tlf. 86255280

YNSKIST
Føroysk familja við tveimum smábørnum ynskir hús/raðhús til leigu í Århus ella nærhendis, evt. í býti við 4 verilsis íbúð við altan í Århus Vest.
Tlf. 86258931

YNSKIST
Grundstykki ella hús ynskist til keyps í Vestmanna.
Tlf. 424224, e. kl. 17

ÍBÚÐ TIL LEIGU
í Keypmannahavn frá 16/6 til 31/8 98.
Tlf. 038119923, e. kl. 17

AALBORG
Íbúð til leigu í Aalborg í summar! Frá 12/7 til 13/8 er ein 3.vær. íbúð við hava og atgongd til vaskimaskinu og turkitrumlu til leigu fyri 2500 kr.
Tlf 98159183 (Hittast best eftir kl.16)"

ÍBÚÐ ELLA VERILSI
ynskist til leigu í Tórshavn, helst nærhendis handilsskúlanum, frá uml. 15. aug.
Tlf. 421368 / 42124C

NORÐOYGGJAR
Bygdarhúsið í Haraldssundi verður leigað út til øll endamál so sum innivist fyri bólkar, skeiðvirksemi, fundir, veitslur og mangt annað. Allir hentleikar. Ring og tú fært meira at vita.
Tlf. 457207 ella 457419

ÍBÚÐ YNSKIST Í KBH.
Yngri par uttan børn ynskir íbúð í/nærhendis Keypmannahavn til leigu/framleigu frá uml. 1. sept. 98.
Tlf. 319795, e. kl. 17

VERILSI TIL LEIGU
í miðbýnum við atgongd til køk og bað. Egin inngongd.
Tlf. 317301

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Keypmannahavn frá 2.7.-8.-7 1998.
Tlf. 310245, e. kl. 17

FERIU Í FØROYUM
Donsk familja, 5 fólk, ynskir at býta um hús í tíðarskeiðnum 11.7.-25.7. Hús okkara eru í Norðursjællandi, nær strond og uml. 30 km. frá Keypmannahavn.
Tlf. 4914649

HÚS Í KOLLAFIRÐI TIL LEIG
Húsini eru rúmlig við stórari garagu og góðum plássi uttan um og sera góðum útsýni.
Tlf. 421255

YNSKIST Í KBH.
Íbúð ynkskist í Keypmannahavn! Hjálp okkum! Ungt par ynskir íbúð til leigu/framleigu frá uml. 15.august 1998.
Ring tlf. 315286 e-mail: alda@post.olivant.fo

KAMAR TIL LEIGU
við Norðara ringveg til friðarligt mannfólk. Atgongd til køk, brúsu, wc, vaskimaskinu og myntteleton.
Tlf. 313730

FRÍTÍÐARHÚS
Gomul frítíðarhús í Hesti til leigu. Tlf. 328039

HYGG HER!
Hevur nakar eitt kamar/ íbúð at leiga mær? Ring Tlf. 314420, e. kl. 18

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru tvær ungar gentur, ið leita eftir einari 3 verilsis íbúð í Havn frá 1. ella 15. aug. 1998. Vit hvørki roykja ella drekka.
Tlf. 443093 (Jacoba)
Tlf. 310098 (Jacoba)
Tlf. 315100 (Turid)

HÚS Á GLYVRUM
Størri sethús á Glyvrum (í góðum standi), til sølu. Prísuppskot 690.000 kr.
Tlf. 313640

TVØROYRI!
Skulu tygum til Suðuroyar og búgva væl? So eru hús í miðbýnum til leigu vikuskiftir ella styttri tíðarskeið. Sera vakurt útsýni yvir Tvøroyrarfjørð.
Tlf. 312205 - 288205

GJÓGV - VIKUSKIFTI/ FERIA
Hevur tú hug at uppliva ta vøkru náttúruna við Gjógv. Vit leiga út eitt sera hugnaligt frítíðarhús við vanligum hentleikum.
Tlf. 423138, 284705, 313423 ella 316505

BYGDARHÚSIÐ Í HÓSVÍK
Bygdarhúsið verður leigað út til veitslur, brúdleyp, føðingardagar, fundarvirksemi, matir o.a. Eisini leiga vit steintoy út. Ring og hoyr nærri um prís og annað.
Tlf. 422386 ella 422435

FERÐIST Í NÓLSOY
– gistið í Líða
Latið gomlu og hugnaligu Líðahúsini í Nólsoy vera kamm um tína frítíð í summar. Kostn.: Bert 300 kr. pr. nátt. Avsláttur verður givin, um gist verður meira enn 3 nætur. Ringið
Tlf. 448001 ella 327030

NÝGGJ FRÍTÍÐARHÚS
í Skálavík til leigu. Húsini standa væl fyri við útsýni yvir bygdina og víkina. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum, sum eisini hava centralhita. Tlf. 311197

HUGNALIG FRÍTÍÐARHÚS TIL LEIGU VIÐ GJÓGV
Tað eru eini eldri hús við øllum hentleikum so sum sjónvarpi og vaskimaskinu. Tlf. 421305

SKEIÐ- OG LEGUHÚS
Hvør segði, at tað kostar ov nógv at skipa fyri skeiðum. Spyrjið á Fjalsgarði! Fjalsgarður 690 Oyndarfjørður
Tlf. 444522 - fax. 44570

Dansur

DANSUR Á STRONDUM
Góður dansur verður á Strondum fríggjakvøldið. Audio spælir. (P.S.: Eingin dansur er leygarkvøldið við tað at tað er hvítusunnuaftan).
Strálan

FRÁ STOKKASTOVUNI
Johnny King spælir fríggjakvøldið. Ókeypis atgongd áðrenn kl. 12
Stokkastovan

Dýr

DVØRGHAMSTRAR!
Ungar undan dvørghamstrara til sølu fyri 50 kr. stk.
Tlf. 317023, spyr eftir Joan

HUNDAHVØLPUR
Sera fittur hundahvølpur undan friðarligari tík av lítlum slagi verður latin 100% djóravini.
Tlf. 312268

TIL SØLU
Ársgamalt heystlyl av føroyska slagnum til sølu. Dímun, 371260

KETTLINGAR
Tveir reinligir og sera fittir kettlingar søkja eftir heimi, so er nakar, ið kann geva teimum eitt heim, ring
Tlf. 313697, e. kl. 19,
Linda

KETTLINGAR
Hey, allir djóravinir. Vit eru tveir sera fittir og loðnir kettlingar. Vit eru reinligir. Omma okkara er ein ekta angora.
Tlf. 310445

TIL SØLU
Fýra vikur gamal Collie hvølpur kann latast djóravini um 3-4 vikur.
Tlf. 447556

HVØLPAR
Border Collie hvølpar av góðum seyðahundaslagi til sølu.
Miðstovugarður á Sandi, tlf. 316057

KETTLINGUR
Sera fittur kettlingur verður latin djóravini.
Tlf. 373346

AKVARIUFISKAR
til sølu, so sum ungaføðandi, vill guppy, kilifiskar.
Tlf. 313025, kl. 15.15-17,
Gunnar

KETTLINGAR
Triggir fittir kettlingar kunnu avheintast um 5 vikur. Tveir eru gráir og ein er svartur (frensur).
Tlf. 319530 ella 310267, kl. 13–18

Fundir

KLAKSVÍKAR DANSIFELAG
Aðalfundur verður sunnudagin 14 juni 1998 kl. 20.00 í Skálanum. Skrá samb. viðtøkum felagsins.
Nevndin

APEX FERÐ
verður burturlutað ímillum gamlar sum nýggjar limir á aðalfundinum hjá Spastikarafelagnum leygardagin 30. mai.

AÐALFUNDUR
Spastikarafelagið hevur aðalfund leygardagin 30. mai í MBF-húsinum. Byrjað verður við Peto fyrilestri kl. 14.

JÓMSVÍKINGAR
Ársaðalfundur felagsins verður í Jómsborg 2. hvítusunnudag kl. 17. Dagsskrá sambært lógum felagsins.
Nevndin

Húsarhaldstól

EL. KOKSMASKINA
Stórur Elektrolux mixari við kjøthakkara o.o. til sølu.
Tlf. 319584

TIL SØLU
400 litrar frystiboks fæst við at koma eftir henni.
Tlf. 333055

TIL SØLU
Eitt vælhildið, hvítt kaliskáp til sølu.
Tlf. 314484

TIL SØLU
Køliskáp til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 310716,
e. kl. 18